# BØNARLØTAN

**MARS** **2026** **41. árg.**

***1. Sunnudagur*** ***Matt. 18.1-18***



*Stephen á outreach í Turkalandi*

**TURKALAND, Istanbul (fj.arb.)**
**Annika og Stephen Everett**

*Outreach* og stuðulsbólkurin *Umit* vilja hava undirvísing sína eftirmetta. Biðið, at skikkaður persónur skal gera hetta. Ætlanin er at hava átta ymisk *outreach* í ár. Minnist tey, sum tey søkja íblástur frá Harranum at náa turkum. Biðið, at Jesus opinberar seg gjøgnum ramadanmánaðin, tá muslimar fasta hvønn dag frá sólarrisi til sólsetur, og øll koranin skal lesast.

## KRINGVARPIÐ

**EVANGELISKA RØDDIN – Aldan (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21 ..... Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21 ......... Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Mánadagur* — *Matt. 18.19-35*



### MEKSIKO, Maravito
### Isabel og Edy Mora
### Marianna 0

Fyrstu vikuna í mars hevur Edy bíbliutímar úr Jóh. fyri ein lærisveinabólk. Stephanie er kvinna, vit møttu á sjúkrahúsi. Familja hennara misti herfyri pinkubarn. Hon vil læra meira úr Bíbliuni. Biðið fyri familjuni og fyri Stephanie, at hon ikki missir mótið, men søkir Harran.



### DANMARK, Hirtshals
### Anna og Hans Djurhuus

Biðið fyri samkomuni í Malta, at Gud signar felagsskapin, at hann gevur vísdóm, styrki og kærleika, so samkoman er ljós og signing. 7. mars kl. 19 verður føroyskt møti í Bethaniakirkjuni, Dag Hammaskjøldsgade 2b í Aalborg.

## *3. Týsdagur* — *Jer. 8.1-22*

### USA, Nebraska, Ethnos 360
### Rachel og Peter Hansen

1.-11. mars eri eg í Florida til leiðarafundir um trygd fyri trúboðarar. Fyrst innan fyri NTM og síðani fyri fleiri trúboðarafeløg.

19.-20. mars verða Rachel og eg í Arizona til leiðslufundir fyri flogdeildina hjá NTM. Vit fara við bili, so vit kunnu vitja ein son og fleiri vinir á leiðini.

**ZAREPTA**

Biðið, at Harrin signar stóru umbyggingina og umvælingarnar. Kunning um arbeiðið og tørv: Agnar Josephsen 216357. Legur: Elstastevna 6.-8. mars, Siloa 13.-15. mars, Hebron Argir 20.-22. mars, Nazaret 27.-29. mars.

## *4. Mikudagur* — *Jer. 9.1-26*

**FØROYAR**

**Birgit og Svenning av Lofti**

Fundir í Suðuroynni: 8.-11. mars í Betel, Vági, og 12.-15. mars í Betania, Porkeri. Boðskapir úr Pætursbrøvunum. Talarar: Poul Johan Djurhuus, Páll á Lakjuni, Svenning av Lofti, Jógvan Páll Sevdal og Hjørleif Vang.

**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



## *5. Hósdagur* — *Jer. 10.1-25*

**SENEGAL, Tongia**

**Lív Poulsen**

Umsetingarráðgevin eftirkannar 1. og 2. Kongabók síðst í mars. Biðið, at vanligi málhjálparin verður tøkur. Vit halda fram at lesa NT fimm kvøld um vikuna. Eg vóni at samla ein bólk aftrat fyrr á degnum at lesa fyri, so vit kunnu koma ígjøgnum alt tilfarið

áðrenn summarið. Vit halda fram at gjøgnumganga kladduna av 5. Mós. og annað tilfar. Biðið fyri teimum trúgvandi, nú føstumánaður er hjá størsta trúarbólkium í landinum.

## *6. Fríggjadagur* *Matt. 19.1-15*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 14, Emma 9**
13.-15. mars halda vit á øðrum sinni samkomulegu. Vit verða á leið 70 fólk. Biðið um eitt lívgandi vikuskifti fyri samkomuna.

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Takk fyri bønir tykkara. Tað hevur gingið framá við týðingini. Vit ætla at gera ein stuttan bókling um páskirnar. Biðið, at fólk læra meira um Kristi deyða og uppreisn gjøgnum hann.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Jónatan 16, Markus 13, Evita 11, Joy 9**

## *7. Leygardagur* *Matt. 19.16-30*




**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 16**
Føstan hjá størsta trúarbólkinum endar 19. mars. Hesa tíðina eru fólk ótolin, og stuldur kemur oftari fyri, tí øll vilja hava eina góða máltíð, tá ið sólin setur. Biðið fyri teimum trúgvandi, at tey fáa góðar møguleikar

at luta trúnna. Trúgvandi maður hevur áhuga fyri starvinum, vit nevndu herfyri. Hann byrjar í mars og skal arbeiða fyribils í tríggjar mán. Hann heldur so fram, um báðir partar eru nøgdir. Biðið fyri okkum um styrki at halda á, og at Harrin leiðir okkum í øllum, vit gera.

## *8. Sunnudagur* *Jer. 11.1-23*



**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
Henda mánaðin arbeiða vit upp á okkara STEVN studio. Tað eru eisini fleiri ymisk online forrit, sum vit mugu nýta, og okkum tørvar rættiliga nógva vegleiðing í øllum hesum. Biðið fyri STEVN studio, okkara tænastu, møtum og framløgum, samtalum og øðrum.

**OM, SUÐURAFRIKA, OM REACH**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 2**

## *9. Mánadagur* *Matt. 20.1-34*

**DANMARK, Frikirken i Bindslev**
Vit minnast Harran hvønn sunnumorgun. Síðani er sunnudagsskúli, har vit brúka tilfarið *Firm Foundation*. Børnini lurta væl og spyrja um tað, vit siga frá. Í bíbliutímunum gjøgnumganga vit Jákupsbrævið.



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 9**

## 10. Týsdagur Matt. 21.1-22



**NTM – FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Tabita 12, Debora 10, Natan 7**
Biðið fyri Remi R. Rasmussen, sum er í trúboðaravenjing á North Cotes College, har eisini vit, Noomi og Eli, fara síðst í mars saman við 13 ungum til trúboðanarráðstevnuna *Reach*.

## 11. Mikudagur Matt. 21.23-46

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Eg takki Harranum fyri, at eg javnan kann læra og hava samskifti við fimm fólk gjøgnum ZOOM á alnótini. Ætlanin er at arbeiða nakað minni í framtíðini. Vit takka stórliga fyri forbønir og stuðul gjøgnum øll árini.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Símun Fuglø, sum er ein av elstunum í samkomuni, er álvarsliga sjúkur av krabbameini. Biðið eisini fyri Hannu, konu hansara, í hesi so tungu tíð.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

## 12. Hósdagur Matt. 22.1-22

**OM Føroyar, TeenStreet**
**Margareth Djurhuus, OM Føroyar**
TeenStreet-leiðslan, Oddvør, Randi og Símun, luttók um mánaðar-

skiftið á várfundinum í Týsklandi. Margareth luttekur á árligu altjóða leiðararáðstevnuni hjá OM í Norðurkýpern 12.-16. mars. Biðið um góð sambond og andaliga styrki til at halda fram í tænastuni. Elisabeth er í *Off the Grid* og kemur heim í mars. Vit samskipa fýra stuttar túrar í summar: TeenStreet-legu í Týsklandi, toymisferð til Suðurfraklands fyri 18-29 ár, TiM-túr til Moldova fyri 15-20 ár og hjálparfólk til legurnar í Suðurgrønlandi saman við Marjun og Páll Poulsen.



Meira á www.om.fo/tak-lut/summarturar.

## *13. Fríggjadagur* — *Matt. 22.23-46*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Tvey vælmannað arbeiðslið koma í juni at gera liðugt ymiskt, eitt nú skifta nøkur gólv, ið eru slitin eftir 13 ár! Vit takka Harranum, at fullteknað er við hjálp til legu 1 og 2. Enn vanta leiðarar til legu 3 og 4 til gentur og dreingir, umframt klaverspælara og fólk til fimm aðrar týdningarmiklar tænastur.

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

Grønlandsferðin 2026 verður frá 14. mai til uml. 20. sept. Okkum tørvar navigatørar, maskinfólk, tónleikarar/sangarar og ikki minst fólk, sum kunnu hava eitt orð. Biðið, at enn fleiri ung vilja luttaka í arbeiðnum. Áhugað ringið 285007.

## *14. Leygardagur* *Matt. 23.1-22*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Vit eru takksom fyri øll tey, sum vilja hjálpa okkum í summar. Vit mangla tó nakrar tilkomnar dreingir ella menn at vera leiðarar ella hjálparleiðarar. Biðið eisini, at fleiri úr samkomuni koma at hjálpa.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

*Í dag fyllir Kristina Nónstein 15 ár

## *15. Sunnudagur* *Matt. 23.23-39*



**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 5, Boas 3, Jóanes 0**

Til fríggjakvøldssamkomuna koma 40-60 fólk. Skipanarbólkur leggur møtini til rættis við talum, vitnisburðum o.ø. Vit brúka nógv fólkið í samkomuni til at hava eitt orð, og vit gleðast eisini, tá ið talarar vitja í Kristnastovu.



**FØROYAR**
- **Else og Poul Johan Djurhuus**
- **Anna Maria og Rógvi Joensen**
- **Khuldah og Sámal Mikkelsen, Samuel 11**
- **Dora og Niels Pauli Nónstein**

## 16. Mánadagur — Matt. 24.1-28

**FØROYAR**
**Atlantic Mission, Juvel II – Outreach fyri ung 17-30 ár.**



24. juli – 4. aug. verða vit í Haderslev og Aabenraa. Nógv ymiskt verður á skránni fyri børn, ung og vaksin, bæði inni og úti. Kostn. 2500 kr + ferðaseðil. Ring ella skriva um tilmelding: Ólavur Thomsen 740303, Ruth Gaardlykke 519090, atlanticmission@mail.fo. Biðið fyri verkinum.

**Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 13, Petra 11**
Í mars fara vit 10 dagar á evangeliseringsferð úr Tróndheimi og norður til Brønnøysund.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**

*Í dag fyllir Lydia Berghamar 9 ár
*Í dag fyllir Evita Tuohy 11 ár

## 17. Týsdagur — Matt. 24.29-51

**OM Føroyar, Logos Hope**
**Margareth Djurhuus, OM Føroyar**




Fleiri, sum hava tænt umborð á skipum hjá OM, verða við til at samskipa vitjanina hjá Logos Hope 27. aug. - 7. sept. Biðið, at Gud vísir okkum sín

vilja, at vitjanin verður til stóra signing, at menniskju verða frelst, og at Gud kallar arbeiðsfólk til skurð sín. Í løtuni eru Jóhanna, Súsanna og Guttorm umborð á Logos Hope. Súsanna og Guttorm koma heim í mars.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**
Samkoman brúkar nú nýggja tilbygningin. Nú byrjar næsta átakið: *STEP IN – at tæna við góðvild*. Biðið, at Gud leiðir okkum í fyrireikingunum.

**Mission Aviation Fellowship, MAF Føroyar**
**Martha og Andrias Hansen**

## *18. Mikudagur* *Matt. 25.1-23*



**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**
Evnið á sunnudagsmøtum okkara seinastu vikurnar hevur verið *Aftur til Orðið*, har vit hava mint á týdningin av at læra Orð Guds at kenna og lata tað gera sítt endurnýggjandi verk í okkum. Biðið, at okkara ungu, lesandi fólk verða sterk í Orðinum og varðveitt í trúnni. berghamar@kristnastova.dk

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 12, Micah 12**

## *19. Hósdagur* *Matt. 25.24-46*



**ONGLAND,**
**Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Lydia 16**

Biðið um vísdóm í arbeiði mínum at venja trúboðarar at útvega sær fíggjarligan stuðul og styrkja sambond við samverkafólk síni. Biðið saman við okkum, at Gud skal gera tað, sum bert Gud kann, bæði í Evropa og aðrastaðni.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna Rodda**

## *20. Fríggjadagur* *Matt. 26.1-25*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 8, Timon 6, Manuel 2,**
**Salome 2**

Samstarvsfelagar okkara koma nakað seinni aftur til Kovol, tí sonur teirra breyt skøvningin. Biðið um grøðing, so tey kunnu koma skjótt aftur. Lesi- og skriviskeiðið, vit høvdu ætlað, byrjar tí eisini seinni, men vit laga okkum eftir ætlan Harrans. Takk, at tit biðja fyri kovolfólkinum.

**INDONESIA, Asmat**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 5, Selah Rose 3**

Vit eru aftur í USA. Tað var gott at síggja familju og vinir og at hava samfelag við heimasamkomuna aftur. Biðið um trygd á vegunum. Vit skulu ferðast víða til nakrar samkomur í USA at

greiða frá arbeiði okkara. Onkustaðni er 18½ tími at koyra frá einari til aðra. Biðið Harran senda okkum samstarvsfelagar í Asmat.

## *21. Leygardagur* *Matt. 26.26-50*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 15, Leah 12, Abigail 7**
Biðið fyri Maxime, ein vinur og lærisveinur. Hann var heimleysur misbrúkari og hevur nú í 2-3 ár hildið seg frá rúsevnum, men stríðist enn við alkohol. Biðið um fulla leking og frælsi.

*Í dag fyllir Trisha Guttesen 14 ár

## *22. Sunnudagur* *Matt. 26.51-75*



**TÝSKLAND, Hückeswagen,**
**Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 14**
Biðið saman við okkum, sum vit fyrireika styttri tænastur fyri árið. Eitt nú er tørvur á fýra heimalærarum í Papua Nýguinea og Miðeystri og fýra fólkum at arbeiða í køkinum á bíbliuskúlanum í North Cotes.

**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**

## *23. Mánadagur* *Matt. 27.1-19*



**PAPUA NÝGUINEA,**
**Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Árliga REACH-ráðstevnan fyri ung verður 27.-29. mars. Eitt fjølbroytt vikuskifti við kunning um Harrans verk og møguleikar at tæna Harranum. Ung úr Evropa luttaka á tiltakinum, sum er fullteknað. Biðið, at alt tiltakið verður til signing og eggjan fyri øll. Í løtuni undirvísi eg teimum, sum eru í trúboðaravenjing, í bíbliuumseting.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

## *24. Týsdagur* *Matt. 27.20-44*



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 17, Noah 16, Karis 12,**
**Judah 10, Ethan 8**

Tað er hart sum foreldur at síggja tvey av børnunum bert annan hvønn mánað. Minnist samkomuna í Lele og biðið fyri vitjanum í Savena og fyri ferðum okkara, nú ránsmannavirksemi og stuldur eru vorðin vanligari. Annika arbeiðir við hjúnaskeiði. Nógv eldri stríðast við heilsutrupulleikar og vantandi heilsuhjálp í frumskóginum. Maui er ólekiliga sjúk av krabbameini. Biðið um trúgv og vón í Kristusi.

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 9, Jude 7, Evelyn 5, Olivia 2**

## *25. Mikudagur* *Matt. 27.45-66*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Eg skal undirvísa í einum bíbliuflokki í samkomuni, har vit ganga á møti, og á eini mansstevnu, sum tríggjar samkomur í grannakommununi skulu hava. Eg fyrireiki fleiri talur, nú vit fara til Malaisia og Filipsoyggjar í apríl og verða har mest sum allan mánaðin.

## *26. Hósdagur* *Matt. 28.1-20*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**
Biðið, at Gud signar arbeiðið við børnum og starvsfólki. Ástjørn verður 80 ár, og veitsla verður sunnud. 12. juli. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## *27. Fríggjadagur* *Jer. 12.1-17*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church, Gudny og John Munro**
Missiónsstevnan í feb. eydnaðist væl. Tað er gott og uppbyggjandi at hoyra um tað, sum Harrin ger gjøgnum trúboðarar á missiónsmarkini. Prís fái Harrin fyri teirra trúfesti.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Leygardagur* *Jer. 13.1-27*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**
Eg undirvísti meir enn 20 monnum í Nayba úr Rómbr. Biðið, at sannleikarnir gerast veruligir fyri teir og onnur í samkomuni. Samkoman fekk eisini 150 síður av tilfari um Rómbr. á sínum

egna máli, sum vit hava arbeitt við í longri tíð. Biðið, at hetta verður byrjanin til nakað heilt stórt, sum Harrin fer at gera bæði í og út frá kankanaey-samkomunum. Liz hevur tað nógv betri nú. Frá at sita í koyristóli fyri tveimum árum síðani kann hon nú fara einsamøll í býin at gera ørindir.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 17**

*Í dag fyllir Lydia Niclasen 16 ár

## *29. Sunnudagur* — *Jer. 14.1-22*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 14, Noah Kristian 11**
Biðið fyri samkomu okkara, *The Gathering*. Vit takka Gudi fyri vøksturin, ið vit hava sæð seinastu 2-3 árini og fyri nýggjar møguleikar í tænastuni. Biðið, at Harrin opnar dyr, so vit kunnu náa kinverjum, ið búgva í Chiang Mai. Vit bjóða nú tulking til kinesiskt á møtunum, og síðsta mánað kom ein kinesisk kvinna til trúgv. Okkum tørvar vísdóm at boða evangeliið og læra tey, ið eru nýggj í trúnni.


| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## *30. Mánadagur* *Jer. 15.1-21*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 16, Nana 14, Louie 12, Rio 6**

Í Japan er miðalaldurin høgur. 30% eru yvir 65 ár, og nógv eru einsamøll. Vit bjóða eldri fólki á kafé, men í løtuni koma fá ikki-kristin. Biðið fyri hesi tænastuni, at samfelag og kærleiki eyðkennir kaféina.

## *31. Týsdagur* *Jer. 16.1-21*

**BÓKATÆNASTAN**

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

**NÝGGJ BÓK!**
**408 síður 300 kr.**




Ein sterk og nemandi frásøgn um trúboðarahjúnini Graciu og Martin Burnham, sum vórðu tikin gíslar av muslimska yvirgangsbólkinum *Abu Sayyaf* og vórðu trýst at flakka um eitt heilt ár í filipinska frumskóginum. Tað byrjaði sum eitt friðsælt vikuskifti, men gjørdist ein ræðulig roynd við hungri, ótta og missi. Mitt í óvissuni stríddust tey við iva og spurningin, um Gud hevði gloymt tey. Hetta er ein søga um trúgv, kærleika og vón undir mest ómenniskjansligu umstøðum – ein vitnisburður um ljós mitt í myrkrinum.

*Meta av Fløtum týddi.*

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo